

Birting komið

Birting 2003 er komið í bókabúðirnar og kostar kr. 80,-

TÍÐINDASKRIV

Hetta er 15. árgangur av blaðnum og innihaldið í ár er fjølbroytt. Stuttsøgur er eftir Steinbjørn B. Jacobsen, Lydiu Didriksen, Frits Johannesen og Sólvør Patursson Niclasen. Yrkingar eftir Jóngerð Poulsen, Sólrun Michelsen og Høgna Egholm Magnussen.

Freydis Poulsen skrivar brot úr Oyra søgu, Johannes Andr. Næs áhugaverda frásøgn um Gøtuna á Fjalli, og Sjúrður Poulsen skrivar um tríggjar minnisverdar hendingar í Skúgvi.

Myndprýtt hava Gyðja Didriksen, Gunnvør Joensen, Frits Johannesen og Maria Smith. Forsíðumyndina hevur Sámal Jákup Joensen tikið eina summarnátt á Fjallavatni.

Lagt til rættis Birting hevur Niels Nattestad.

Norröna til Íslands alt árið

10. januar komandi ár broytir Smyril Line vetrarferðaætlanina hjá Norrönu, so Ísland eisini verður partur av vetrarskránni. Í nýggju vetrarferðaætlanini verður harumframt beinleiðis samband millum Hanstholm og Bergen

TÍÐINDASKRIV FRÁ SMYRIL LINE

Beint eftir nýggjár — 10. januar 2004 — tekur Smyril Line Ísland upp í vetrarferðaætlanina hjá Norrönu, og harvið eru øll londini á summarrutuni hjá Smyril Line við í vetrarferðaætlanini.

Broytingin hevur eisini við sær, at beinleiðis samband verður millum Hanstholm og Bergen. Sostatt verður í vetrarhálvuni hvørja viku siglt: Hanstholm-Bergen-Lerwick-Tórshavn-Seyðisfjørður-Tórshavn-Lerwick-Bergen-Hanstholm.

– Hetta beinleiðis sambandið úr Hanstholm um Bergen, Lerwick og Tórshavn allan vegin upp til Íslands í vetrarmánaðunum er ein liður í áhaldandi menningini av siglingini í Norðuratlantshavi við okkara nýggja skipi. Nýggja vetrarferðaætlanin gevur ferðafólkum úr Evropa møguleikan at vitja Ísland við bili alt árið, og harumframt verður okkara farmaleið til Íslands meira støðug, sigur Óli Hammar, stjóri í Smyril Line.

Tveir dagar í Íslandi

Tá nýggja vetrarferðaætlanin hjá Norrönu verður sett í gildi, ber til at steðga tveir dagar í Íslandi, um tað ikki liggur fyri at vera har eina heila viku. Norröna verður á Seyðisfirði kl. 09.00 týsmorgun og fer avstað aftur mikudag kl. 18.00.

– So hóast fólk velja tann stutta Íslandstúrin, fáa tey stundir at vitja Mývatn og onnur áhugaverd støð á Eysturlandinum, og góðar stundir verða at heinta og útflýggja farm um alt Ísland, vísir Óli Hammer á.

Ferðafólk á rundferð við Norrönu í vetrarhálvuni kunnu frá 10. januar næsta ár steðga í Føroyum mánadag og seinnapart hósdag. Norröna kemur á Havnina kl. 06.00 mánamorgun og fer til Seyðisfjarðar mánadag kl. 17.00. Hon kemur aftur til Føroya úr Íslandi hósdag kl. 13.00 og siglir síðani til Lerwick, Bergens og Hanstholm hóskvøld kl. 20.30.

Norðmenn fáa eitt serligt ferðatilboð í nýggju vetrarferðaætlanini hjá Smyril Line, tí nú verður møguligt at fara stuttar vikuskiftistúrar úr Bergen til Hanstholm. Farið verður úr Bergen fríggjakvøld klokkan 21.30, og komið verður til Hanstholm leygardag kl. 11.00. Norröna siglir úr Hanstholm aftur leygardag kl. 16.00 við kós ímóti Bergen, Lerwick, Tórshavn og Seyðisfirði.

Nýggj lánsbrøv

Landsstýrið gevur nú nýggj lánsbrøv út. Samlaða upphæddin á hesum er hálvonnur milliard

LÁNSBRØV
Tíðindaskriv frá Landsbankanum

24. november 2003 gevur Føroya Landsstýri út nýggj lánsbrøv. Lánsbrøvini verða í trimum ymiskum røðum, við ymiskari lánstíð og rentu. Upphæddin er tilsamans 1.500 mió kr:

1. 2003/2004: 750 mió kr 1 ára lánsbræv, áljóðandi renta 2%
2. 2003/2006: 375 mió kr 3 ára lánsbræv, áljóðandi renta 3,5%
3. 2003/2008: 375 mió kr 5 ára lánsbræv, áljóðandi renta 4,25%

Útgivnu lánsbrøvini skulu partvís nýtast til at endurfíggja verandi lánsbrøv, 300 mió kr, sum falla til gjaldingar 11. desember 2003, og restin, 1.200 mió kr, til framskundaða afturgjalding av láni frá danska statinum. Umframt nevndu 1.200 mió kr somuleiðis afturrindaðar statinum av tøka gjaldførinum, soleiðis at afturgjaldingin verður 1.700 mió kr.

Lánsbrøvini verða noterað á Kauphøll Íslands hf og útgivin á virðisbrævamiðstøðini VP í Danmark.

Landsbanki Føroya og Nordea Bank fyriskipa lánsbrævaútgávuna, og Føroya Sparikassi og Kaupthing Føroyar eru með-fyriskiparar.

Lánsbrøvini verða seld í Føroyum og uttanlands, og endaligi kursurin verður ásettur mikudagin 19. november.

Prospekt um lánsbrævaútgávuna er tøkt á heimasíðuni hjá Landsbanka Føroya: www.landsbank.fo.

Skuld landskassans

Aftaná framskundaðu afturgjaldingina verður skuld landskassans munandi broytt, og niðanfyri sæst samansetingin áðrenn og aftaná umfiggingina:

Mió kr	Áðrenn umfigging	Aftaná umfigging
Danski Staturin (1998-2018)	3.351	1.651
Danski Staturin (2018) *)	500	500
Lánsbrøv	300	1.500
Onnur skuld	102	102
Tilsamans	4.253	3.753

**) Kr. 500 mió er lán, sum er partur av avtaluni við donsku stjórnina frá 1998. Lánið er rentu- og avdráttarfrítt til 2018, tá tað skal tilgjaldingar ella fellur burtur, alt eftir um kolvetnisframleiðsla til ta tíð fer fram í føroysku undirgrundini*

Framhald á síðu 4

tosa og snýta ráðgevaran, soleiðis at torført er at raka tey. Tey vilja vita, um ráðgevin er eins og "hini" tvs. foreldur, vinir og onnur tætt knýtt at teimum, helt Jesper Grubach áfram við.

Eingin byrjar uppá eina misnýtslu uttan, at viðkomandi fær okkurt burturúr. Oftani fáa tey eina falska kensla av, at tey fáa okkurt burturúr. Av teirri orsøk er tað ikki bert eitt mál at fáa tey burtur úr misbrúkinum, men áhaldandi at vegleiða misnýtararnar og geva teimum betri tilboð enn tað, ið misnýtslan gav teimum. Tað handlar um at fáa eyguni upp fyri røttum lívsvirðum, segði Jesper Grubach.

Vertshúsið sum heimstaður

Ein rúsdrekkamisnýtari kennir seg heima í einum føstum vertshúsi. Tvs. tað vertshúsið, ið misnýtarin altíð gongur á. Barrvørurin veit sum oftast, hvør misnýtarin er, tosar virðiliga og vinarliga við misnýtaran. Hetta gevur misnýtaranum eina kenslu av heimi og tryggleika. Tískil er tað góð samvera og virðing, sum misnýtarin ofta søkir. Hevði tað ikki verið fyri rúsdrekka, so hevði hann ikki kunnað fylt hetta nógv saknaða tómrúm út. Tískil leggur Jesper Grubach enn einaferð dent á, er tað sera torført sum ráðgevari at vísa misnýtaranum á onnur betri tilboð, sum tað rúsfría lívið borgar fyri.

Eins og fótbóltsdeildirnar

Jesper Grubach samanbar misnýtarar við eina deild í fótbólti. Ein misnýtari vil heldur vera best í tí ringasta deildini enn at liggja niðast í tí bestu. At liggja ovast í verstu deildini er t.d. at berjast mest, at drekka mest, at rópa harðast v.m. Politikarnir eru sera torførir at fáast við, tí ið umrøður upplýsing og onnur kunnandi tiltøk. Tað skal altíð greinast og viðgerast út í æsir. Uttan avhaldsfeløg hevði eingin kunning verið, segði Jesper Grubach.

Hvat við pengum til upplýsing?

Tað er sera speisemiligt at hugsa sær, at í Danmark verða 25 % av játtanini til heilsuverkið nýtt til viðgerðir av misnýtarum av ymsum slag. Meðan loyvini at selja rúsdrekka og økja um útboðið støðugt skulu økjast, soleiðis at peningur kann fáast til vega at fíggja viðgerðirnar. Tískil víst hann á tað sama, sum Mart in Kúrberg vísti á, at pengar til upplýsing er tað, ið vit sum íbúgvar í einum samfelag av álvara hava tørv á.

Smábørn við brennivínssodavatn

Flestu handlarnir í Danmark eru givnir at selja sodavatnlíknandi brennivín, men enn eru tað tey stóru sølustøðini, sum selja tað. Hjá teimum handlar tað bert um útboð og eftirspurning. Er eftirspurningurin har, ja, so verður tað selt, segði Jesper Grubach. Trupulleikin er tann, at hetta slag av brennivíni verður sett við síðuna av vanligum sodavatni. Tað kemur meiri enn so fyri, at smábørn ganga og fylla seg við hesum innihaldi, tí tey halda tað vera sodavatn.

Niðurstøða

Jesper Grubach endaði við at siga, at tað er av sera stórum týdningi, at avhaldsfeløgini eru virkin. At tey virka kunnandi, vegleiðandi og duga at vísa á sonn lívsvirði. Ein alkoholikari við útbúgving innan evnið er helst tann besti ráðgevin, tí hann hevur bestu innlivingarevnini.

Birgir fær dreymastarv

Komandi ár verður ein føroyingur rektari á Nordisk Journalistcenter, NJC. Birgir Kruse skiftir starvið sum kunningarstjóri í Norðurlandahúsinum út við eitt dreymastarv í einum tí elsta norðurlendska stovninum, sum heldur til í Århus

STARV
Ingi Rasmussen
ingi@sosialurin.fo

KLIPP. Norðurlendskur filmur hevur stóra áhugan hjá Birgiri Kruse. 1. februar setir hann ein nýggja spola á, tá hann verður rektari hjá Nordisk journalistcenter í Århus

Mynd: Álvur Haraldsen

Í húsinum hjá føroyingafelagnum í Århus hongur eitt uppslag. Birgir Kruse, best kendur fyri sína djúpu og mentaðu útvarpsrødd, sóknast eftir einari íbúð frá komandi ári.

Orsøkin er, at hann eftir øllum at døma verður rektari á Nordisk Journalistcenter, sum hevur skrivstovu í Århus. Starvið verður ikki sett endaliga fyrr enn 4. desember, men Birgir Kruse er einmælt innstillaður av stýrinum fyri NJC. 14 umsøkjarar vóru til starvið, men alt bendir sostatt á, at 46 ára gamli føroyingurin fær tað.

– Eg kann vátta, at stýrið fyri NJC einmælt hevur víst á meg, men eg noyðist samstundis at leggja dent á, at tað er mentanarnevndin undir norðurlendska ráðharraráðnum, sum tekur endaligu avgerðina, sigur Birgir Kruse.

Hann viðgongur kortini, at hann er farin at gleða seg, og uppslagið í Áarstovu vitnar um, at hann eisini er farin at fyrireika seg.

– Hetta er eitt dreymastarv og ein stór uppgáva, sum eg gleði meg til. Eg havi alt mítt lív fingist við undirvísing og journalistikk. Havi eisini altíð havt serligan áhuga fyri tí norðurlendska, so tað verður ikki nógv betri, sigur Birgir Kruse, sum í løtuni starvast sum kunningarleiðari hjá Norðurlandahúsinum í Havn.

Birgir Kruse er útbúgvin lærarari og hevur harafturat tikið PD á Pedagogiska Universitetinum í Keypmannahavn um samskifti og miðlar.

Norðurlendskur kjarni

Nordisk Journalistcenter er millum teir elstu av 30 stovnum undir Norðurlandaráðnum. Í roynd og veru er stovnurin javngamal við Birgir Kruse, sum er føddur í 1957.

– Grundsjónarmiðið er, at journalistar í Norðurlondum eru tann størsti einsháttaði bólkurin av mentanararbeiðarum. Uppgávan hjá NJC er tí at tryggja, at tað altíð er journalistar, sum eru serkønir í norðurlendskum viðurskiftum. At tað altíð er ein kjarni, sum viðger tað, sum er frammi í Norðurlendskum høpi, sigur Birgir Kruse.

Virksemið savnast um 11 skeiðsvikur, har átta teirra eru samanhangandi. Talan er um eina eftirútbúgving, sum best kann lýsast sum eitt grundskeið í dagførdum norðurlendskum viðurskiftum. Føroyingar hava luttikið sum fyrilestrarhaldarar, og seinast røddi Jóannes Eidesgaard um føroysk viðurskifti. Harafturat eru skeið í einstøkum norðurlendskum evnum yvir eina og tvær vikur.

Birgir Kruse hevði óivað ein fyrimun fram um aðrar umsøkjarar. Hann hevur sjálvur fingið norðurlendsku journalistvirðislønina, sum verður latin av Nordbok. Virðislønina fekk hann fyri eina røð av útvarpssendingum, har hann yvir trý ár viðgjørdi norðurlendskar bókmentir, og tí er hann sjálvur eitt dømi um mentanarberan, sum samansjóvar Norðurlond.

Nógvar visjónir

Sjálvur hevur Birgir ongantíð verið á adressuni hjá NJC í Århus, men hann hevur longu gjørt sær onkrar tankar um, hvat hann ætlar sær. Eitt mál er at geva føroyingum og grønlendingum betri atgongd til stovnin.

– Á staðnum er bæði útbúgving og studentagarður, og skeiðið kostar 18.000 krónur við øllum. Tey stóru londini fáa alt rindað, og ein uppgáva verður at ávirka viðkomandi myndugleikar soleiðis, at Føroyar og Grønland fáa somu rættindi. Eg vil gera tað møguligt hjá føroyingum at koma á skeiðini, tí áhugin er stórur. Tað vísir seg, at tess minni eitt land er, tess størri er norðurlendski áhugin, sigur Birgir Kruse.

Grønlendingar hava eina journalistiska útbúgving, men í Føroyum er einki. NJC hevur áður skipað fyri skeiðum í Føroyum, og tað er eisini ætlanin frameftir. Við at geva føroyingum møguleika at taka lut í journalistisku eftirútbúgvingini vónar Birgir Kruse, at okkurt verður sett í gongd.

– Journalistisk útbúgving er ikki til í Føroyum, og tað er eitt øgiliga stórt trot á eftirútbúgving. Kanska fær NJC hjálpt til at skumpa undir at fáa eina rættiliga føroyska journalistútbúgving, tí tørvurin er stórur, sigur Birgir Kruse.

Í aðrar mátar fer NJC eisini at vera merkt av, at ein føroyingur kemur at standa við stýrisvølin.

– Í sambandi við tað næsta Prix Føroyar kundi eg hugsað mær at fokusera serliga upp á tónleik og journalistikk við støði í føroyskum tónleiki, sigur Birgir Kruse, sum eisini vísir á, at áhugin fyri viðurskiftum í útnorði er stórur.

Útnorður og freelance

Annars umboðar hann øll Norðurlond, og tí ræður um at fylgja við í, hvat rørir seg í norðurlendska samstarvinum og at skipa fyri skeiðum, sum upplýsa journalistar í teimum viðurskiftunum.

Síðstu árini hevur útnorður havt stóran áhuga, og tað sampakkar eisini væl við eina visjón hjá Birgir Kruse. Hann hevur skotið upp at seta á stovn eina norðuratlantiska tíðindastovu, tí mangan eru upplýsingarnar bæði tilvildarligar og skeivar, sum koma úr økinum, tí journalistarnir kenna ikki umstøðurnar.

Sjálvur hevur Birgir Kruse arbeitt sum freelance journalistur í 25 ár, og tað fer helst eisini at síggjast aftur í virkseminum.

– Eg kundi hugsað mær at skipa fyri einari freelance stevnu. Rættindini hjá free-lancarum eru ikki serliga væl umsitin. Teir hava einki fakfelag og eitt nú upphavsrættindini hjá free-lancarum eru ógvuliga tilvildarliga viðfarin, sigur Birgir Kruse.

Birgir Kruse loysir Stein-Ove Grønsund av sum rektara fyri Nordisk journalistcenter tann 1. februar 2004. Um ráðharraráðið vil.

Fakta

Navn: Birgir Kruse
Aldur: 46 ár
Útbúgving: Lærari og pedagogiskt diplom
Størv: Free-lance journalist, lærari, kunningarleiðari o.m.a.
Annað: Fekk Nordisk Journalistpris frá Nordbok í 1998

Fiskur fær frítt at fara

Nýggjar reglur eru ásettar fyri, hvat tú kanst innflyta av mati til Danmarkar og onnur ES-lond til privata nýtslu. Verða reglurnar ikki hildnar, fer vøran retur

MATVØRA
Ingi Rasmussen

Reglurnar fyri innflutningi av mati til Danmarkar og restina av ES eru herdar. Sum skilst eru nøgdirnar, tú kanst taka við tær, tær somu, men eftirlitið er hert.

Tú kanst taka óavmarkað av fiski og fiskavøru við tær. Í hesum er íroknað turrur og ræstur fiskur. Við kjøtinum, grind og fugli er øðrvísi. Innflytir tú seyða- og neytakjøt skal hægst eitt kilo vera í hvørjum pakka. Kjøtið kann vera saman við øðrari matvøru, men mongdin kann í mesta lagi viga fimm kilo.

Tú kanst í mesta lagi hava fimm kilo av flogfenaði, fugli og haru, grind, eggum til matna og pasteuriseraðari mjólk og mjólkaúrdrátti, stendur at lesa á heimasíðuni hjá Fødevaredirektoratet, fdir.dk, har eitt samlað yvirlit fæst.

– Verða reglurnar ikki hildnar, sleppur vøran ikki inn í Danmark og verður send aftur til Føroya. Um matvøra skal takast til annað ES-land enn Danmark, er skilagott at spyrja heilsufrøðiligu myndugleikarnar í landinum um reglurnar fyri innflutninginum, áðrenn sent verður úr Føroyum, sigur Ingibjørg Egholm av matvørudeildini hjá Heilsufrøðiligu starvsstovu.

Reglurnar eru ásettar fyri at forða fyri innflutningi av smittu, sum kann gera donsk dýr sjúk. Reglurnar skifta javnan, tí hugt verður eftir heilsustøðuni hjá dýrum í einstøku londunum. Reglurnar eru bara galdandi fyri privatan innflutning.